**Avtala millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya:**

**Avtala um regluliga arbeiðsvakt á Heilsufrøðiligu starvsstovuni í sambandi við útflutning av matvørum, har kravið er, at veteriner- ella heilsuváttan skal útflýggjast**

***1. Endamál***
Í sambandi við regluligan útflutning úr Føroyum av fiski og fiskavørum, serliga til 3. lond so sum Russland og Kina, er kravið, at tað skal fylgja ein veteriner- ella heilsuváttan við vøruni, áðrenn vøran fer úr Føroyum. Uttan kravdu heilsuváttanina sleppur vøran ikki inn í 3. landið.

Fyri útflutning til Russlands er kravið haraftrat, at tað skal gerast 100 % fysiskt eftirlit av hvørjum partíi, ið verður útflutt.

At røkja hesa uppgáva uttanfyri upplatingartíðir stovnsins verður gjørd ein **reglulig arbeiðsvakt.**

***2. Skilmarkingar***
Grundleggjandi verður regluliga arbeiðsvaktin skipað við tilkalling og arbeiði í arbeiðsvaktini, og fevnir um í mesta lagi tveir limir, fevndir av sáttmálanum hjá AKF. Av hesum kann annar vera embætisdjóralækni.

Embætisdjóralæknin og/ella annar limur, fevndur av AKF-sáttmálanum, ið røkir regluligu arbeiðsvaktina, er vanliga tann sami, ið røkir vaktina, fevnda av avtaluni "*Avtala um veterinera tilbúgvingarskipan á Heilsufrøðiligu starvsstovuni*".

***3. Regluliga arbeiðsvaktin***
Regluliga arbeiðsvaktin er uttan fyri stovnsins vanligu arbeiðstíð. Arbeiðsvaktin verður mannað við í minsta lagi einum embætisdjóralækna og/ella øðrum limi, fevndur av AKF-sáttmálanum. Arbeiðsvaktin er antin 16-24 ella 16-08 gerandisdagar, fríggjadag tó frá kl. 15. Í vikuskiftinum kann arbeiðisvaktin verða 8-20 (12 tímar) ella 8-8 (24 tímar).

Í arbeiðsvaktini eru AKF-limirnir tøkir eftir avtalu við viðskiftararnar, tá ið arbeiðið skal fremjast í arbeiðsvaktini.

***4. Uppgávur***
Regluliga arbeiðsvaktin skal so skjótt sum til ber fremja tær atgerðir og uppgávur, sum eru neyðugar fyri at kunna veita viðskiftarum veteriner- ella heilsuváttanir í s.v. útflutning, áðrenn vøran fer av landinum.

Innanhýsis eftirlitsmanualur og upplæring annars eru grundarlagið undir arbeiðnum.

Dentur skal leggjast á, at veteriner- ella heilsuváttanirnar verða gjørdar lidnar í regluligu vaktini og fysiskt útflýggjaðar viðskiftaranum.

***5. Vaktarplanur***
Heilsufrøðiliga starvsstovan ger, í samráð við luttakararnar í regluligu vaktarskipanini, ein vaktarplan fyri í minsta lagi tveir mánaðir í senn.

Vaktarplanurin er treytaður av rutuferðaætlanini hjá flutningsfeløgunum. Um flutningsfeløg ynskja aðrar rutur, er teirra fráboðanarfreist 3 mánaðir. Uppsøgn av rutuferðaætlan er 3 mánaðir.

Fyri hvørja rutu (t.d. fráferðir úr Føroyum hóskvøld við Norrønu) er vaktarplanur tøkur í minsta lagi 3 vikur, áðrenn hann gerst virkin og kann fara úr gildi við 3 mánaða freist.

Meginreglan er, at starvsfólk skulu hava fráboðan um vaktargongu við 3 vikur freist. Meginreglan er somuleiðis, at eingin einstakur persónur skal knógva undir vaktarbyrðu samfelt longur enn 1 viku á hvørjum sinni, og skal, alt tað ber til, síðan verða frítikin fyri vaktargongu eins leingi. Heilsufrøðiliga starvsstovan kann ikki áleggja AKF-limum at arbeiða meira enn 60 tímar í somu viku uttan samtykki.
Verða vaktarboð givin við styttri enn 3 vikur freist, hækkar vaktarpeningurin við 100% fyri álagda vaktarskeiðið.

***6. Samsýning***
Fyri at vera tøk fær regluliga arbeiðsvaktin rindað minimum 2 tímar gerandisdagar og 4 tímar leygardagar, sunnudagar, halgidagar og fastar frídagar, og vaktarpening, sum er 12,25% av tímalønini hjá viðkomandi. Tímalønin (ársløn/2080) verður roknað av grundlønini, t.e. ikki av viðbótum. Responstíðin er 2 tímar. Vaktarpeningurin er tað dupulta um náttina, leygardagar, sunnudagar, halgidagar og fastar frídagar. Tá ið arbeitt verður í regluligu arbeiðsvaktini, verður hetta samsýnt við 200% av vanligu tímalønini hjá viðkomandi. Halgidagar og fastar frídagar 300%. Samsýningin verður rindað fyri hvønn byrjaðan ½ tíma.

Vaktargjald kann avspákast í samráð við leiðsluna ella útgjaldast.

Vanliga verður arbeitt út í eitt eftir vanliga arbeiðstíð. Annars telur arbeiðstíðin frá tí, at AKF-limur fer heimanífrá og til komið verður heimaftur.

***7. Ígildiskoma***
Avtalan verður sett í gildi tann 20. februar 2017. Avtalan kann verða søgd upp saman við sáttmálanum.

*Tórshavn, 24. januar 2017*

*Akademikarafelag Føroya* | *Fíggjarmálaráðið*